Starvslýsing

Heimatænastan

Deildarleiðarar til eldrasambýlir kring landið

Lýst verður eftir deildarleiðarum til eldrasambýlir kring landið. Talan er um nýggj størv innan Nærverkið, har uppgávan er at hava dagligu leiðsluna av einum ella fleiri sambýlum við tilvísing til økisleiðaran.

Eldrasambýlini, sum talan eru um, liggja í Hoyvík, Vestmanna, Kollafirði, Eiði, Skála, Fuglafirði, Toftum, Norðagøtu, Leirvík, Klaksvík, Sandur, Skálavík, Skopun, Tvøroyri, Vági og Hvalba.

Eldrasambýlini veita búfólkunum fyribyrgjandi, viðgerandi og rehabiliterandi røkt og umsorgan í heimligum umhvørvi.

Ábyrgdarøki:
- Tryggja dygd og samanhang í røktini og tænastuni
- Gera arbeiðsætlan til starvsfólkini
- Vegleiða og stuðla starvsfólkunum
- Móttøka av nýggjum búfólkum
- Virka fyri at skapa eitt heimligt og trygt umhvørvi fyri einstaka búfólkið
- Virka fyri, at avvarðandi og onnur vitjandi til eina og hvørja tíð kenna seg vælkomnan í heimið
- Jaligt samskifti við aðrar stovnar

Førleika:
- Heilsufaklig útbúgving
- Hug og hegni at fyrisita og leiða
- Evni at samstarva við búfólk, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Gunnleyg Durhuus, leiðara fyri eldraøkið, tlf. 304020.

Setanartreytir:
Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er í løtuni í Heimatænastuni. Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Størvini eru til flokkingar fyri heilsurøktarar og heilsuhjálparar í løtuni.

Umsókn:
Send eina umsókn við avrit av prógvi og upplýsingum um útbúgving og fakligar royndir til:
Nærverkið
Postsmoga 3037
110 Tórshavn
Stílað: Gunnleyg Durhuus, leiðari fyri eldraøkið

Umsóknarfreist: 4. juni 2007

Les meira á www.naerverk.fo / leys størv

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

petur & petur • 320870

Forkela mammu ókeypis við einum fínum døgurða í Glasstovuni - saman við familjuni

Mammudagin kl. 12.00 - 22.00 bjóðar Glasstovan eina matskrá við 3. rættum. Prísur kr. 225,- fyri hvønn yvir 12 ár - mamman ókeypis.

Matskrá:
Kinarækjur við hummarabisque
Oksamedallion við stoktum grønmeti og rómaglace
Pannacotta við rabarbukompotti og krapa

Barnaborð kr. 75,- fyri hvønn.

Bíleggið borð á 31 75 00. Vit skapa góð minni.

GLASSTOVAN
The Favourite Restaurant

Tú ert við at keypa inn, selja, vegleiða og ráðgeva kundum okkara. Tú sleppur at royna teg í bæði pappírs- og í bókadeildini, ella kanst tú velja aðra sum sergrein.

Í lærutíðini verður tú eisini send/ur til Danmarkar á skeið.

Tú mást hava FHS/HH ella studentsprógv. Lærutíðin er 2 ella 3 ár, alt eftir hvørja skúlagongd tú hevur.

Løn og setanartreytir eru sambært galdandi lærusáttmála.

Er hetta nakað fyri teg, so send eina umsókn til: kari@ritograk.fo, ella send hana til Rit & Rák, postboks 1158, 110 Tórshavn.

Ert tú ikki heilt liðug/ur við skúlan enn, og heldur, at hetta er tað rætta fyri teg, skalt tú ikki halda teg aftur. Vit bíða fegin eftir tær.

Rit og rák, størsti bókahandil í landinum, er eitt spennandi arbeiðspláss.

Vit selja bøkur, skrivstovulutir og aðrar smálutir til fólk flest, til vinnulívið og til skúlarnar.

Góð tænasta er okkara mál!

Rit&Rák

sms • postboks 1158 • FO 110 Tórshavn • tel 603030 • ritograk@ritograk.fo • ritograk.fo

AFS Føroyar
Altjóða ungdómsumskifti

Postboks 1351
110 Tórshavn
Tel 312991 / 223130
eholm@post.olivant.fo
www.afs.dk

Kunningarfundur

um AFS virksemi verður sunnudagin 13. mai kl. 15.00 í samkomuhøllini á Føroya Studentaskúla í Hoydølum.

Fundurin, har AFS'arar greiða frá royndum teirra, er bæði um vertsfamilju- og sendiprogrammið.

Øll eru vælkomin!

Far út
í heimin
ella
gev familju
tykkara
nýggjan
íblástur
uttan
úr
heimi

Lesið **Sosialin** -so eru tit við!